## Bankastjórar niður í løn

Nýggja stjórnin í Íslandi hevur gjørt greitt, at eingin alment løntur íslendingur skal fáa meiri løn enn landsins forsætisráðharri, og at hon er sinnað at broyta lógir, um tað er neyðugt. Skipanin skal eisini umfata stjórar í almennum partafeløgum. Íslendski forsætisráðharrin fær 935.000 krónur um mánaðin, og avgerðin hjá stjórnini merkir, at lønin hjá stjóranum í Íslandsbankanum og forstjóranum í Kauptingi skal niður í helvt, og at stjórarnir í Landabankanum á Landssjúkrahúsinum í Reykjavík skulu meiri enn 30 prosent niður í løn. Fleiri aðrir almennir stjórar missa eisini nógva løn.



## Uppsagnir hjá Nike

Búskaparkreppan rakar nú eisini fyritøkur í ítróttarheiminum. Um vikuskiftið kunn gjørdi tann kenda skó- og klædnaverksmiðjan Nike , at hon hevði gjørt av at koyra fimm prosent av starvsfólkunum til hús. Tað merkir, at umleið 1.750 fólk missa arbeiðið. Leiðslan sigur, at 500 starvsfólk á høvuðsdeildini í Beaverton í statinum Oregon missa arbeiðið. Hini, sum missa arbeiðið, arbeiða nú á deildum ymsastaðni í heiminum. Leiðslan í Nike sigur, at eftirspurningurin eftir Nike-vørum er minkaður orsakað av kreppuni, og at tað sama er galdandi fyri merkini Converse, Umbro og Cole Haan, sum Nike eigur.

# Oddvør Johansen á nýnorskum

**Væl umtókta skaldsøgan »Í morgin er aftur ein dagur« eftir Oddvør Johansen kemur nú í Noregi á nýnorskum**

TÝÐING
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Skaldsøgan »Í morgin er aftur ein dagur« eftir Oddvør Johansen kemur nú út á nýnorskum við heitinum »Tider skal komme«

Tað er norski týðarin Lars Moa, sum hevur týtt væl umtóktu bókina hjá Oddvør Johansen, sum kom út fyrstu ferð í 1998.

### Kærleiki og politikkur

Frá forlagnum verður sagt, at bókin snarar kring nógvar persónar, stættir og umhvørvi, har politiskir og sosialir mótsetningar spæla ein týðandi leiklut.

»Við innlivan, humor og heitum hjarta sigur høvundurin eina søgu um kærleika og um menniskju, sum við sínum skapandi evnum vinna fram, um tey, sum í staðin finna ugga í vekingarrørslum og rúsdrekka og um tey, sum geva upp, tí sosialu karmarnir eru ov trongir.«

Í hesi lýsingini av føroyska samfelagnum undan øðrum veraldarbardaga gevur havið mat og arbeiðið, men havið er eisini vegurin burtur úr vónloysi og armóð. Umhvørvið í Føroyum í hesum tíðarskeiðinum er ikki ólíkt nógvum norskum samfeløgum um hetta mundi, og tí fara norskir lesrarar uttan iva at kenna seg aftur í bókini, væntar forlagið

Í 2001 var »Í morgin er aftur ein dagur« í uppskoti til Norðurlendskubókmentaheiðursløninna. Tá segði Jógvan Isaksen, bókmentafrøðingur soleiðis um bókina:

- Tvey høvuðstema í bókunum hjá Oddvør Johansen eru tónleikur og erotikkur, bæði saman og hvør sær, og bæði eru við størstu sjálvfylgju við í hesi skaldsøguni. Skaldsøgan er skiftandi og undirhaldandi, og tað er við sorgblídni, lesarin leggur hana frá sær eftir síðstu síðu.

Tað er norska forlagið Fonna, ið gevur bókina út.




*Nú fyrsta dagin kemur skaldsøgan »Í morgin er aftur ein dagur« hjá Oddvør Johansen út á nýnorskum við heitinum »Tider vil komme«*

JOBB OFFSHORE



GRUNNLEGGENDE KURS I BORE- & BRØNNTEKNIKK

**Nytt grunnkurs etter Vg2 brønnteknikk fagplan.**

Kurset er inkludert Grunnleggende sikkerhetskurs, Stropp-, fallsikrings- og riggerkurs, Traverskran kurs og VHF-kurs.

**Kurs i Stavanger 15.06 til 30.09.09 + 1 uke selvstudie**

**Søknadsfrist: Snarest**

Anbefalte forkunnskaper: Fagbrev/svennebrev mekaniske fag eller studentereksamen + praktisk arbeidserfaring. Du må forstå og beherske norsk.

NORTRAIN er behjelpelig med å finne bosted under kurset.

NORTRAIN
Tangen 10, 4070 Randaberg
E-mail: mr@nortrain.no • **www.nortrain.no**
Telefon 51 69 27 00. Telefaks 51 69 27 27.

NORTRAIN
norwegian drilling academy

# Vencil rakar nútíðina

**Samspælið millum menniskjað og nútíðarsamfelagið er tema í skaldskaparritinum Vencil, sum júst er komið út á sætta sinni**

TÍÐARRIT
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Til hesa sættu útgávuna eftirlýsti Vencil tekstir, sum so ella so lýsa samspælið millum einstaka menniskjað og nútíðarsamfelagið.

Afturfyri kann skaldskapartíðarritið hesuferð bjóða eina røð av stuttsøgum og yrkingum, sum lýsa fløkta nútíðarsamfelagið og eitt nú átrúnað, sum í vaksandi mun myndar gerandisdagin, eisini í Føroyum.

### Breitt úrval

Upprunaføroysku stuttsøgurnar eru hesaferð fleiri í tali. Vit finna eitt nú "Gongubreytin" eftir Anniku Skaalum, sum debuteraði í seinasta Vencili, og "Exit Farao" eftir Hanus Kamban, sum á hvør sín hátt lýsa, hvat kann henda, tá tøknin tekur ræði á menniskjanum.

Søgurnar "Hann ið týndi mannaættina" eftir Agnar Artúvertin og "Hin blái eingilin" eftir Sólrún Michelsen geva hvør sína upplivingav fundamentalismu.

Yrkingarnar bjóða somuleiðis tulkingar av somu evnum, yrkingar eftir høvundar sum Dáv í Dali, Maluna Poulsen, Berg Rønne Moberg, Z. Dam og Wilhelm, Vagn Streymoy og Agnar Artúvertin. Aðrar meiri tilverutulkandi yrkinar eru eisini við, eftir høvundar sum Sissal Kampmann og Rannvá Skeel Jacobsen.

Fleiri týddir tekstir eru eisini við. Millum annað stuttsøguna "Fiti" eftir amerikanska stutt-søgumeistaran Raymond Carver, og stuttsøgur eftir donsku rithøvundarnar Jan Sonnegaard og Jørn Fabricius.

Amerikanska Anne Carson hevur heilar 11 yrkingar við, og sum nakað heilt serligt hevur Vencil fingið sendandi eina týðing av yrkingini "Løgin frukt" eftir Abel Meeropol, sum er best kend sum "Strange Fruit", ið Billie Holliday gjørdi kenda í síni tíð.

Vencil fæst í bókabúðunum ella á heimasíðuni www.vencil.fo.

Ritstjórar eru Oddfríður M. Ramsussen og Arnbjørn Ó. Dalsgarð.




*Sætti Vencil snarar krin einstaka menniskja í alsamt meir fløkta nútíðarsamfelagnum*